Fyrisøgn til 4. flokk – innseting

Mai 2009

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir millum skrástrikurnar lisnir tvær ferðir. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva).

Í **dag hevur verið /** ein so **góður dagur** í skúlanum./ Longu **tá ið** eg **vaknaði, / visti** eg, / at okkurt **gott /** fór at henda./ Pápi **vakti meg**, / og **tá ið hann** dró / gardinurnar **frá** vindeyganum í kamarinum, / **sá eg**, / at **sólin** skein / **bæði oman og niðan**. / Eg **leyp** á **føtur /** og **fór** út í baðirúmið / og **vaskaði** mær / og **bustaði tenn**, / og so **át** eg morgunmat / **saman** við familjuni./ **Tá ið** eg **hevði** etið, / skundaði eg mær at **renna / yvir** til **bussin**./
Vit syngja **altíð** morgunsang í fimleikarhøllini./ Í **morgun sungu** vit "Nú skínur sólin bjarta"./ **Aftan** á at vit **høvdu** sungið, / **segði** skúlastjórin, / at **allur** skúlin / skuldi **fara** útferð./ **Tað** kom rættiligt róp í, / og **øll ætlaðu** at leypa avstað, **/ men** fyrst **skuldu** vit / **fara** inn í **okkara** skúlastovu / og **fáa** nærri **boð** um, / **hvussu** vit skuldu / **bera okkum** at./ Hans er flokslærari **hjá** okkum, / so **hann** kom **við** okkum / **inn** í stovuna./ **Hann segði** okkum, / at hvør **flokkur** fór / saman **við sínum** flokslærara./
Hans **hevði** verið hjá bakaranum / í **morgun** / og keypt **breyð** og onkran viðskera, / so fyrst smurdu vit **okkum** / ein **matpakka** / at **hava við**./ **Hann hevði eisini** keypt saft./
Vit fóru **niðan** á Stórafjall, / og tað er ein **langur túrur**, / men sjálvt um **tað** var **tungt** / at **ganga** niðaná, / so er tað so vakurt **har uppi**, / at tú **gloymir** møðina./ Vit **sóu** nógvan fugl, / og vit sóu eisini **nógvar blómur**./ Eg sá **eisini** eina haru; / **Hans segði**, / at tað **var Helena** hara./
Nú eri eg **móður** / og ætli mær **skjótt** í **song**, / men eg **vildi** ynskt, / at **fleiri skúladagar vóru** sum hesin./